# Viðskiftatreytir

## Vinnuligt Fríhald

### Viðskiftatreytir

Hetta skjal greiðir frá viðskiftatreytunum fyri vinnuligu fartelefonhaldini Fríhald galdandi frá 19. januar 2017.

### Viðskiftatreytirnar fevna um

Hesar viðskiftatreytir eru galdandi fyri vinnuligu fartelefonhaldini Fríhald. Viðskiftatreytirnar eru sertreytir í mun til Almennu Viðskiftatreytirnar hjá Føroya Tele. Um samsvar ikki er millum hesar viðskiftatreytir og Almennu Viðskiftatreytirnar, eru tað hesar, sum eru galdandi. Har einki verður nevnt í hesum treytum, eru Almennu Viðskiftatreytirnar hjá Føroya Tele galdandi.

### Øll Fríhald

Fyri ein fastan mánaðarligan kostnað fært tú hetta í øllum Fríhaldunum:

- Fría talu í Føroyum.
- Frítt sms í Føroyum.
- Eina avmarkaða nøgd av data at nýta í Føroyum.

### Fríhald 8GB og 16GB

Umframt fría talu, frítt sms í Føroyum og eina avmarkaða nøgd av data at nýta í Føroyum, fært tú hvønn mánað hesar tænastur við í hesum báðum haldunum:

- Reika sum heima í øllum Evropa og Ísrael.
    - Tosa í mesta lagi 20 tímar úr Føroyum og til alt Evropa og Ísrael.
    - Tosa í mesta lagi 20 tímar í og úr øllum Evropa og Ísrael og ímillum galdandi lond.
    - Í alt 1000 sms at senda báðar vegir.
    - Brúka upp til 10GB av íroknaðu datamongdini í øllum Evropa og Ísrael.

**Fríhald 32GB og 52GB**

Umframt fría talu í Føroyum, frítt sms í Føroyum og eina avmarkaða nøgd av data at nýta í Føroyum , fært tú hvønn mánað hesar tænastur í hesum haldunum:

- Reika sum heima í øllum Evropa og Ísrael.
  - Tosa í mesta lagi 20 tímar úr Føroyum og til alt Evropa og Ísrael.
  - Tosa í mesta lagi 20 tímar í og úr øllum Evropa og Ísrael og ímillum galdandi lond.
  - Í alt 1000 sms at senda báðar vegir.
  - Brúka upp til 10GB av íroknaðu datamongdini í øllum Evropa og Ísrael.

- Reika sum heima í USA, Kina, Kanada og Russlandi.
  - Tosa í mesta lagi 40 tímar úr Føroyum og til USA, Kanada, Kina og Russland.
  - Tosa í mesta lagi 40 tímar í og úr USA, Kanada, Kina og Russland og ímillum galdandi lond.
  - Í alt 1000 sms at senda báðar vegir.
  - Brúka upp til 10GB av íroknaðu datamongdini í USA, Kanada, Kina og Russlandi.

**Serlig viðurskifti**

Fría nýtslan kann ikki nýtast til sertænastur og yvirtakseraðar tænastur.

- **Tala**: Samrøður, ið verða avroknaðar, verða avroknaðar fyri hvønn byrjanarminutt. Fría nýtslan fyri hvørja einstøku samrøðu er bert galdandi fyri samrøður upp til 1 tíma. Um farið verður upp um 1 tíma, verður yvirnýtslan avroknað til vanligan minutttakst í Føroyum og vanligan reikingarkostnað uttanfyri Føroyar. Rátt verður til at leggja á og ringja uppaftur.

- **Data**: Datanýtsla verður avroknað fyri hvørji 30 KB.
- **Datanýtsla í Føroyum**:
  - Tá íroknaða datanøgdin er uppi, fært tú eina fráboðan við sms, samstundis sum vit lækka ferðina á internetinum. Hóast ferðin lækkar, fært tú kortini brúkt internetið til tey mest átrokandi ørindini, so sum at lesa teldupost.
  - Ongin meirkostnaður stendst av nýtsluni, eftir at ferðin er lækkað.

- Datanýtsla uttanlands:
  - Tá íroknaða nýtslan í Evropa er uppi, fært tú eina fráboðan við sms. Eftir at íroknað data eru uppi, verður vanligur reikingartakstur uppkravdur.
  - Ert tú í einum landi, sum ikki er galdandi í Reika sum heima, eru.vanligir takstir galdandi. Sí prísir her.
  - Um tú fórt upp um íroknaðu datamongdina, meðan tú vart í útlandinum, lækkar ferðin, tá tú kemur heim.
  - Møguligt er at keypa eyka datapakkar til Fríhaldini.
  - Sí lond í Reika sum heima her.
  - Íroknaða nýtslan kann ikki nýtast uttan fyri lond í Reika sum heima. Tá verður vanligur reikingarkostnaður rindaður.
  - Fylgjast kann við nýtsluni á Sjálvgreiðsluni ella Vinnurúminum. Eisini ber til at senda SAL til 1441 og fáa upplýst, hvussu nógv er brúkt.

Føroya Tele tekur fyrivarni fyri veiting av Fríhald, um samlaða avtalugrundalag hjá kundanum við Føroya Tele er ov lágt. Upplýsingar um hald og kostnaðir eru at finna á heimasíðu okkara her.

### Dragurenta og a⊠minningargjald

Rindar kundin ov seint, hevur Føroya Tele rætt til at krevja dragurentu av rokningarupphæddini fra⊠gjaldkomudegnum, til goldið verður og at krevja a⊠minningargjald fyri hvørja a⊠minning, ið verður send fyri ov seint goldna tænastu.

### Brekfráboðan

Miðað verður ímóti, at rætting av breki er byrjað innan 3-5 dagar frá tí, at Føroya Tele hevur móttikið eina brekfráboðan frá kundanum. Arbeiðstíðin er frá kl. 8.00 til kl. 16.00 gerandisdagar. Fráboðast kann á tel. 809047 alt samdøgrið.

### Broytingar

Broytingar, ið sum heild eru til fyrimuns fyri kundan, kunnu setast í verk beinanvegin og uttan aðra ávaring frammanundan. Aðrar broytingar, við undantaki av príshækkingum smb. §6 í Almennu viðskiftatreytunum, kunnu setast í verk við minst 1 mánað ávaring til eitt mánaðarskifti.